# Legendan Karl Anton Klein



*Charlie, coolasti Føroyingurin í øllum universinum*

**Hósdagin 30. august fór - í mínum eygum eitt tað mest virðismikla menniskjað nakrantíð at seta føtur á hesa jørð - til jarðar í Vestmanna. Karl Anton Klein var, er og eigur størsta íblásturin á mítt lív, umframt á mong onnur. Hóskvøldið varð hildin minniskonsert fyri okkara Charlie, og bæði ung, yngri, eldri og uppaftur eldri vóru samlað til eitt ótrúligt og virðismikið kvøld við gandaðum tónum**

MINNISKONSERT

*Eyðun Müller Thomsen*

Minniskonsertin varð hildin í kjallaranum í Kagganum í Havn. Har fleiri ymiskir litfullir tónar fyltu hølini við kenslum, sum livdu 100% upp til Charlie og hansara stóra innsats til lívið.

Klokkan var 21:00, og fólk byrjaðu at samlast til ein góðan kaffimunn, sodavatn ella bara eina góða og kalda øl. Men hetta vóru ikki bara hvør sum helst „fólk". Hetta vóru Charlie'sa fólk. Familja, vinir, meira vinir og meira familja og so sjálvandi eisini hansara størstu og mest trúgvandi „fans".

Fyrsti bólkurin, sum valdi at spreiða sínar veingir og spæla sínar tónar fyri Charlie, vóru ungu menninir úr The Story Ends.

The Story Ends er ein bólkur Charlie tók sær bæði væl og ringt av. Antin kundu teir rena seg langt uppundir ella fáa bæði rís og rós av sínum besta slag, líka til fuglarnir sungu.

Teir fýrdu síni egnu løg av, og hvørt tað einasta hevði eina lítla fitta søgu um Charlie og tí orku hann legði í bólkin. Bólkurin hevur sum so nógvir aðrir, hildið til í ART hølinum uppi yvir Margarinfabrikkini í Havn.

ART stendur fyri Áhugafelag Rokk Tónleikara, og Charlie var leiðari. Við øðrum orðum, „Guardian Angel". Í fleiri ár hevði Charlie fingurin á pulsinum og var við til at hjálpa øllum teimum, ið tørvaðu hjálp. Líka frá tónleikinum, skúlanum og entá sálarligum sjúkum. Øll komu væl burturúr hesum aftaná at hava tosað við Charlie. Hann sá alt verða møguligt. Vart tú tónadeyvur, smæðin ella bara bangin, so fekk hann hálað sjálvsálitið fram í tær, so tú var um at skrædna.

Nógv vildu eisini meint, at maðurin var ein profetur frá framtíðini. Hann vísti alvorligani á tey problemir Føroyar høvdu - og hava. Tey ungu í dag skuldu og skulu hava betri umstøður til tey ymsu tingini, her m.a. Charlie'sa høvuðsmál. Tónleikin. Men álíkavæl valdu nøkur av teimum, ið sita undir gullinum í hesum landi, at ávara Føroya fólk um bøssar og lesbisk, seta siggarettirnar eina milliónkrónur upp í prísi og byggja 114 gullbeløgd meinigheitshús og kirkjur. Tað er einki galið við tí, men onkur, onkunstaðni hevur alvorliga tikið feil. So er tað sagt. Men hetta er neyvan seinastu ferð, tíverri.

Aftaná The Story Ends takkaðu fyri seg og yngstu Charlie eitt nýtt gott og friskt lív, kom Føroya trúgvasta punk trio og yvirtók pallin. 200 hava eina langa søgu aftan fyri seg, so langa at eg ongan kjans havi at forklára. Men tað eg kann siga er, at einaferð vóru hesir gubbarnir á skúlabeinkinum hjá Charlie. Og man sær tíðiligani í dag, at tað kom bara heilt væl við. Kanska eisini eitt av teimum bestu tingunum, sum er komið fyri her í Føroyum tey seinastu nógvu árini.

48 Pages er bólkurin, sum eg sjálvur var við til at rokka hóskvøldið. Vit spældu eitt av Charlie'sa best dámdu løgum, Me And My Boyfriend. Og endaðu sjálvandi við at gera okkara størsta „pile" í søguni. „Pile" merkir at í einum serlignum petti í lagnum, okkara lagi í hesum føri, leypa allir limirnir í bólkinum út á gólvið og kasta seg niður, og síðani koma áskoðararnir við. So hevur man ein stóran bunka av fólki á gólvinum. Tað er ein sannur „pile". Og hetta var nakað, sum Charlie elskaði. Tey flestu vita sikkurt, at tey seinastu trý árini var 48 Pages Charlie'sa yndis rokkbólkur, og hann var sjálvandi eisini við til at skapa føroyska rokksøgu saman við bólkinum. Næstan hvørt vikuskifti vóru konsertir antin í Gøtu, Fuglafirði ella í Havn. Charlie var loyalur yvir fyri bólkinum og var við til hvørja einastu konsert. Men ikki var hetta nokk til at gleða Charlie. Hann vildi, at bólkurin skuldi uppliva alt. Og tað kann man næstan eisini siga vit gjørdu. Charlie syrgdi fyri live studio upptøkum, sum bleiv til eina rokkuppsamling við heitinum Ampaljóð. Hann syrgdi fyri, at bólkurin fór